# Makrel verða útblakaðir í næstu viku



Somu viku sum rokkbólkurin Makrel við lagnum Forever and Beyond kanska tryggja sær norðurlendskan útgávusáttmála, verður bólkurin tveittur av listanum í 15 teimum bestu. Eins og Musclemanblað gjørdi hesa vikuna, fyrnar lagið í næstu viku og gerst ov gamalt til føroyska popplistan.

Eitt lag sleppur ikki at vera á hitlistanum longur enn 15 vikur, og tí verður lagið, hóast tað sjálvdan hevur verið meira aktuelt, tikið av listanum. Men meðan 200 kunnu troysta seg við, at lagið Mamma er komið inn á listan, stendur verri til hjá Makrel, sum ikki hava fingið eitt annað eykalag við í sendingina.

Tað ber til at atkvøða fyri bæði Makrel og Eyð Berghamar Jakobsen í Nordic Band Unsigned finaluni einaferð um døgnið á www.nordicunsigned.com



## Tey kendu Eivør í Penticton

Eivør og Bill Bourne, sum í løtuni eru á konsertferð í Kanada, spældu í seinastu viku á Dream Café Í Penticton, Eivør spældi tríggjar konsertir á hesum stað seinast hon var í Kanada, og flestu av áhoyrarunum vóru fólk, sum høvdu verið á konsertunum seinast. Hetta hoyrdist millum annað tá tey sungu við í enska partinum av »Mær leingist« Sambært Eivor.com var hetta næstan sum at koma heim, fólk kendu tónleikn og komu at heilsa uppá.

Eivør hevur spælt á fleiri festivalum seinastu tíðina, ein av teimum var í Canmore, festivalurin hevði umleið 8000 áskoðarar, og móttøkan av tónleikinum hjá Eivør var sera góður, og bíðirøðirnar fyri at fáa autograf vóru langar aftan á framførsluna, skrivar Eivor.com

**nud**

# Filmur um Gasolin seinkaður

Kim Larsen, sum júst hevur avlýst sína konsert í Føroyum, og hinir limirnir í Gasolin, hava klandrast so mikið illa við Anders Østergaard sum filmstjórnar nýggja dokumentarfilmin um tónleikabólkin, at filmurin nú er seinkaður í eitt hálvt ár. Væntandi verður frumsýningin í februar.

Fyrrverandi gittarleikarin Franz Beckerlee sigur við BT, at teir nú samdir um øll viðurskifti, og allir partar eru nøgdir.

Filmurin fortelur søguna, um stórsta danska rokkorkestrið nakrantíð, og millum annað eru samrøður við allar limirnar í bólkinum.

**nud**

## Spæl betur bridge

Svend Novrup, sum hevur skrivað einar 30-40 bridgebøkur, heldur vikuskiftið 19. til 21. august skeið fyri føroyskum bridgespælarum.

Svend Novrup hevur eisini verið landsliðsvenjari hjá bridgelandsliðnum hjá monnum og hevur á tann hátt verið við at menna føroyskt brigde.

Fríggjakvøldið og leygardagin heldur hann skeið, sum byggir á bók hansara »Major 5 farve«. Sunnudagin verður skeið í »Roman Key Card Blackwood«. Til ber at tekna seg til bæði skeiðini ella velja annað.

Fríggjakvøldið verður byrjað kl. 19.30 og leygardagin og sunnudagin kl. 13.00.

Tilmelding og nærri upplýsingar fáast við ringja 210833 ella 319419.

Fyri tey, sum kundu hugsa sær at lært bridge verður bridgeskúli í heyst undir Kvøldskúlannum í Tórshavn.




